
Mynd: Ning


Mynd: Ning


Mynd: Ning



Mynd: Ning

fóru av pallinum, var tað so sanniliga eisini uppá sítt pláss at kalla teir favorittar. Teirra tónleikur er ógviliga stílreinur. Teir spæla eitt nútímans slag av teen/punk/rock sum vit kenna tað frá bólkum sum Grenn Day. Tó haldi eg meg hoyra eitt ávíst persónligt "touch" í The Dreams, og tað frøði mítt hjarta. Teir eru heilt einfalt klassi! Teir virka sum um teir eru í góðari venjing, smálutirnir sita væl, og um man skal tosa um ein bólk við altjóða "apeal", so munnu The Dreams verða eitt av okkara bestu boðum uppá tað.

**Moja** er sokallaður superbólkur. Tey hava føroyskar heimsstjørnur sum manning, og tískil vóru tey mett at verða ein upplagdur kandidatur at vinna seg í tjóðarfinaluna. Og tey skuffaðu ikki. Orkestrið svingaði sera væl, og sangarinnurnar sungu sera væl. So hetta burdi verið "piece of cake" hjá teimum. Og tað var tað eisini. Uttan at fáa nakað í kók, spældu tey seg trygt inn í tjóðarfinaluna. Sjálvur haldi eg, at løgini vóru eitt sindur 80´araslig, so eg loyvi mær at ivast í, um hetta er ein bólkur, ið vit skulu rokna við fer at vinna seg allan vegin til London. Tað var ógviliga trygt og pent, og gjørdist meir ella minnið ófarligt. Eg saknaði eitt sindur av einum broddi, sum gav tónleikinum ein greiðari samleika.

Singer/songwriter stílurin verður nógv spældur fyri tíðina. Og Lív Hansen er spælur tónleik frá tí traditiónini. Hennara framførðsla var ógvuliga intim. Lív tekur seg væl út á pallinum, og hon hevur okkurt yvir sær, sum ger at ein trýr uppá tað ið hon sigur. Hennara bleyti, eymi tónleikur er væl skrivaður, og hon syngur teir eisini sera væl og inniligt. Orkestreringin av fyrsta lagnum var tíðanverri ikki góð. Bólkuri spældi alt ov hart uppímóti hennara rødd, og hetta ørkymlaði ikki sørt. Tó gjørdu teir (saman við ljóðmanninum) alt gott aftur í næsta lagi. Hetta er eitt einastandandi lag, nokk tað besta á kvøldinum! At Lív ikki var vald at koma víðari, irriterar meg, tí at hon er eitt ordans talent, sum so sanniliga hevði kunna tikið plássið hjá onkum av hinum bólkunum í tjóðarfinaluni.

**Synarchy** eru ein rokkbólkur, sum bara koyrur frameftir. Ljóðið hjá teimum er milt sagt rótut og óruddiligt, men teir eru stuttligir at upplivað, og teir hava nógv uppá hjarta. Men teir spæla ikki serliga væl, og burdu hugsa meiri um samanspæli, tí tað hevði lyft teirra tónleik á eitt heilt annað støðið. Eg hevði ilt við at hoyra løgini fyri larmi. Og tað kann ikki vera meiningin, ha?

At enda kom ein nýggjur bólkur á pallin. Bólkurin **Non Sence** er av Eiði, og teir spæla rokk. Stílurin var rættiliga difusur – teir leita helst enn eftir tí rætta soundinum, men tað hoyrdist á teimum, at teir hava potentiali til at gerast góðir. Teir spæla sum ein trio, og tað er rættiliga torført at fylla ljóðmyndina út sum ein trio, og eisini krevur tað ótrúliga nógv av teimum einstøku tónleikarunum. Men tað sá ikki út til at nerva Non Sence, sum bara koyrdu á. Og teir gjørdi tað fínt.

Nú var bara eftir at fáa at vita hvør ið var komin víðari, og hvør ið ikki slapp at luttaka í tjóðarfinaluni. Teir flestu bólkarnir vóru upplagdir, og tá ið vit fingu at vita at Lama Sea, Týr, Frostbit, The Dreams, Moja og Synarchy komu víðari, var tað ikki eitt so øðiliga stórt yvirraskilisi. Tó haldi eg persónliga at Lív Hansen skuldi átt tað eina plássið. Eg gleði meg at hoyra meira frá henni.

## Javnstøðan hevur tað gott

Hóskvøldið vóru 12 bólkar á pallinum. Og ofta hevur verið kjakast um, at tað eru ov fá konufólk sum spæla tónleik í Føroyum. Men í gjár upplivdu vit nakað deiligt. 6 kvinnur vóru á pallinum og sungu. Laila Hansen, Barbara Carlsen og Vanja Justinusen sungu í Moja, Lív Hansen syngur sjálvandi við Lív Hansen, Torfríð Arnfríðardóttir syngur í Purpur og Carla Martha Josenius syngur í Frostbit.

Felags fyri allar kvinnurnar er, at tær allar syngja. Vónandi fara vit skjótt at síggja tær spæla uppá bass, trummur ella gittar.








Myndir: Ning